UTTAN ÚR HEIMI

Verri at vera fátækur

Guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, hevur nú lagt sítt fyrsta figgjarlógaruppskot fram. Har eru útreiðslur fyri 99 milliardir dollarar, men inntøkurnar eru bert 85 milliardir.

Í uppskotinum sæst, at guvernørurin hevur valt at halda vallyftið um, at skatturin skal ikki hækka. Hann ásannar, at tað verður truplari at vera fátækur í Kalifornia tað næsta árið, tí játtanin til tey veiku í statinum er skerd. Men sum ikki einaferð er umberingin, at undanmaður hansara framdi fleiri mistøk, sum krevja umfatandi broytingar og eina øðrvísi raðfesting.

Eygleiðarar halda kortini, at tá saman um kemur, er ikki so stórur munur á búskaparpolitikkinum hjá Schwarzenegger og undanmanni hansara, Gray Davis. Ein av atfinningunum ímóti Davis var, at ein ov stórur partur av figgjarlógum hansara varð figgjaður við lántøku. Schwarzenegger ger tað sama. Hann skal læna sjey milliardir dollarar.

Hitabylgja var ein ábending

Tað er hugsandi, at hitabylgjan, sum herjaði Evropa seinasta summar, og sum kravdi fleiri túsund mannalív, var so ógvuslig, at slíkt hendir bara eina ferð hvørji 10.000 ella kanska hvørji 50.000 ár. Men tað er eisini hugsandi, at honm var ein ábending um, hvat vit kunnu vænta okkum, nú tað gerst altsamt heitari á Jørðini.

Tað siga sveitsiskir veðurlagsgranskarar. Danski veðurlagsgranskarin Jens Hesselbjerg Christensen, sum arbeiðir á dansku veðurstovuni, hevur arbeitt saman við sveitsisku granskarunum. Hann sigur við Jyllandspostin, at tað ber illa til at ímynda sær, at hitabylgjan seinasta summar bara var eitt tilvildarligt frábrigdi í veðurlagnum.

Tvørturímóti heldur hann, at hitabylgjan í Evropa var tann fyrsta álvarssama avleiðingin av tí veksandi hitanum á Jørðini. Hann vísir á, at hitabylgjan samsvarar við tær avleiðingar, sum veðurgranskarar hava tosað um. Hinvegin kann hon eisini vera eitt tilvildarligt frábrigdi, sum kemur eina ferð fyri hvørji 10.000 ár, sigur Jens Hesselbjerg Christensen.

Stórsmuglari tikin

Løgreglan í Panama tók í vikuskiftinum Arcangel de Jesus Henao Montoya, sum gongur undir navninum "Kokain-kongurin".

Henao Montoya er ættaður úr Kolombia og verður hildin at vera varaleiðari í tí næststørsta smuglarafelagsskapinum har. Bróður hansara, Orlando, varð hildin at vera leiðari í hesum felagsskapinum, men í 1997 valdi hann at geva seg yvir til myndugleikarnar. Hann varð settur í fongsul, men varð myrdur í fongslinum árið eftir. Aftan á morðið gjørdist Henao Montoya tann sterki maðurin í felagsskapinum, og fleiri lond, teirra millum USA, hava kravt at fáa hann útflýggjaðan, bleiv hann tikin.

Nú løgreglan í Panama hevur tikið Henao Montoya, hevur hon tann trupulleika, at hon veit ikki, hvat hon skal gera við hann. Men tað verður helst Kolombia ella USA, sum fær hann.

Einsamøll til Suðurpólin

Fyri fyrstu ferð hevur ein einsamøll kvinna megnað at taka seg fram til Suðurpólin.

Tann 37 ára gamla Fiona Thornewill, sum er úr Nottinghamshire, kom til Suðurpólin nú um dagarnar. Ferðin eftir ísinum var 1.127 kilometrar long. Tað tók Fionu Thornewill 42 dagar at koma til pólin, og sostatt ferðaðist hon 24 kilometrar um dagin. Við sær hevði hon eina sleðu við útgerð, sum vigaði 129 kilo.

Upprunaliga ætlanin hjá ensku kvinnuni var at gerast tann fyrsta kvinnan, sum einsamøll kundi gera ferðina til Suðurpólin. Men nú ferðin tók 42 dagar, hevur hon sett met. Tað gamla metið var 44 dagar, sigur BBC.

Jesus bað meg myrða hana

Mijailo Mijailovic er nú ákærdur fyri at hava myrt Onnu Lindh. Hann hevur greitt løgregluni frá, at hann hoyrdi eina rødd biðja seg beina fyri henni. Tá løgreglan spurdi hann, hvør tað var, svaraði hann: -Jesus

LINDH-MORÐIÐ
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Mijailo Mijailovic: -Eg hoyrdi eina rødd biðja meg myrða hana. Tað var Jesus.

Svenska løgreglan er ikki í iva um, at tann 25 ára gamli Mijailo Mijailovic segði satt, tá hann í síðstu viku játtaði, at tað var hann, sum stakk Onnu Lindh, uttanríkisráðharra so meint, at hon doyði á sjúkrahúsinum morgunin eftir.

Løgreglumenninir tóktust eisini vísir í teirra søk, tá teir gjáramorgunin kunngjørdu, at Mijailo Mijailovis nú formliga er ákærdur fyri morðið. Leif Jennekvist, sum hevur staðið fyri kanningunum hjá løgregluni, boðaði frá sjálvari ákæruni og legði fram eina 1.120 síður stóra frágreiðing um málið.

Á tíðindafundinum bleiv fráboðað, at løgreglan ætlar sær bara at kalla trý vitni til rættarfundirnar. Eitt teirra er Eva Franchell, sum var við Onnu Lindh í NK-handilshúsinum vanlukkudagin tann 10.september. Harafturat skal ein rættarlækni avhoyrast sum vitni og eitt umboð fyri ein stovn í Bretlandi, sum hevur staðið fyri teimum teknisku kanningunum.

Løgreglan fer at vísa rættinum eitt fjúrtan minuttir langt sjónband úr handilshúsunum NK og PUB. Á tí sæst, at Mijailo Mijailovic gekk aftan á Onnu Lindh, og at hann var á drápsstaðnum.

Teknisk prógv

Herumframt hevur løgreglan ymisk teknisk prógv. Eitt nú verða húgvan og buksurnar, sum Mijailo Mijailovic var í tann dagin, lægdar fram í rættinum. Klæðini, sum Anna Lindh var í, verða eisini lødd fram, og harafturat verða fingramerki nýtt sum próvtilfar.

Løgreglan heldur seg hava knívin, sum varð nýttur til morðið, og blóð hjá Onnu Lindh er funnið uppi á buksunum hjá tí ákærda. Sonevndar "fibrur" av buksum hansara eru funnar uppi á knívinum og uppi á buksunum, sum Anna Lindh var í. Hetta eru tey sterkastu teknisku prógvini ímóti Mijailo Mijailovic.

– Eg væntaði, at hann fór at játta seg sekan beinanvegin, tí tey teknisku prógvini eru so góð, segði Leif Jennekvist gjáramorgunin. Hann segði, at ákæruvaldið fer at royna at prógva, at tá Mijailo Mijailovic fór í NK-handilin hendan dagin, hevði hann gjørt av at myrða Onnu Lindh. Hann mátti fara aftan á henni, og hann visti, at tað var Anna Lind, sum hann leyp á, segði Leif Jennekvist.

Dugnaligur verji

Eydnast tað ákæruvaldinum at prógva hetta, fær Mijailo Mijailovic lívlanga fongsulsrevsing, men verji hansara, Peter Althin, fer uttan iva at royna at fáa hann dømdan eftir einari aðrari lógargrein, sum gevur heldur linari revsing. Svenskir løgfrøðingar halda kortini, at tað verður trupult hjá verjanum at fáa undirtøku fyri hesum.

Hinvegin skal verjin ikki undirmetast. Tann 62 ára gamli Peter Althin er kendur sum ein sera dugnaligur verji. Fyri nøkrum árum síðani eydnaðist tað honum at fáa ein mann fríkendan. Hesin hevði fingið lívlanga fongsulsrevsing fyri morð og hevði sitið átta ár, tá tað eydnaðist Peter Althin at fáa hann fríkendan.

Umframt at vera sakførari er Peter Althin limur í svenska ríkisdegnum.

Anna Lindh varð stungin í Stockholm tann 10. september. Morgunin eftir doyði hon

Stórur áhugi

Tað eru fá drápsmál, sum hava vakt so stóran ans, og sum hava fingið so stórt pláss í fjølmiðlunum sum Lind-morðið. Bæði svenskir og útlendskir fjølmiðlar hava fylgt málinum, og fundarhølið á løgreglustøðini í Stockholm var eisini fult av tíðindafólki, tá ákæran varð kunngjørd gjáramorgunin.

Rættarmálið ímóti tí 25 ára gamla manninum verður í einum serligum trygdarsali í rættarhúsunum í Stockholm. Tey, sum ætla sær inn hagar, verða kannað bæði væl og virðiliga. Av teimum 90 plássunum hava tíðindafólk fingið nógv tey flestu. Bara 15 pláss eru ætlað almenninginum. Men tað fer at bera til at fylgja rættarmálinum í útvarpi og sjónvarpi. Bæði svenska útvarpið og sjónvarpsrásin TV4 fara at senda haðani, men tað verður bara ljóðið, sum verður sent. Tí svensk lóg bannar myndaupptøkum í slíkum rættarmálum.

Rættarmálið um Lindh-morðið byrjar tann 14. januar og heldur fram tann 15. og tann 19.

»Lægens Bord« í Føroyum

Á fyrilestrunum í Føroyum fer læknin at handa »Månedens Buket«, umframt at hann fer at svara spurningum, sum føroyingar seta honum

Kendur lækni
tíðindaskriv

Kendi danski sjónvarpslæknin, Peter Qvortrup Geisling, fer um mánaðarskiftið at halda fyrilestrar í Føryoum

mynd: dr.dk

Kendi danski sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling, hevur ongantíð verið í Føroyum fyrr, og tí gleðir hann seg tí ómetaliga nógv til at koma henda vegin. Øll kenna henda fryntliga lækna, sum í eitt longri tíðarskeiði hevur bergtikið sjónvarphyggjarir í Danmark og Føroyum. Sum fyrilestrahaldari er hann sera væl avhildin, og um man skal hyggja eftir, hvussu nógv fólk longu nú hava víst fyrilestrunum áhuga, so er eingin ivi um, at tað verður fultsett.

Tað verða sum sagt tveir fyrilestrar. Tann fyrri verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 31. januar kl. 15.00 og tann seinni á Hotel Norð sunnudagin 1. februar kl. 19.00, og er tað IRIS í Klaksvík sum samskipar vitjanina hjá læknanum.

»Månedens buket«

Í samband við at læknin vitjar í Føroyum, so er meiningin, at hann skal handa eitt blómutyssi til ein føroying, sum á ein ella annan hátt, hevur útmerkað seg innan tað føroyska heilsuverkið. Tað kann verða ein lækni, sjúkrasystir, portørur, heimasjúkrasystir, heimahjálpari, o.s.fr. Eisini kunnu fólk innstillast, sum hava t.d. lagt eitt stórt arbeiði í ein serligan felagskap ella uppgávu. Øll tey sum skjóta onnur upp, verða við í kapping har 5x1 atgongumerkir til »Lægens Bord« verða burtur lutað.

Ein serlig nevnd hyggur í gjøgnum øll innkomin brøv, og verður »Månedens Buket« handað á fyrilestrinum sum verður í Norðurlandahúsinum 31. januar 2004. Uppskot kunnu sendast til í. Seinasta freist at koma við uppskotum er hósdagin 15. januar 2004.

Spurningar til læknan

Umframt sjálvar fyrilestrarnar, so fer læknin at svara uppá ymiskar spurningar, sum hann hevur fingið frá føroyingum. Teir mest áhugaverdu spurningarnir verða svaraðir undir fyrilestrinum.

Atgongumerkir á forsølu

Atgongumerkir til Norðurlandahúsið kunnu keypast í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni, meðan atgongumerkir til Hotel Norð, kunnu keypast á Statoilstøðini í Klaksvík.

Verður ullin aftur gull?

Undirtøkan fyri royndarprojektinum viðvíkjandi ull í 2003 var heilt góð, og fekk samskipanarbólkurin meira ull inn, enn roknað varð við frammanundan

ull
tíðindaskriv frá Royndarstøðini

Ásannandi at vit í Føroyum hava havt ein trupulleika av, at ullin ikki verður tikin upp og fingin til høldar, og sostatt liggur og sløðist til ampa fyri bæði fólk og fæ, setti landastýrismaðurin í landbúnaðarmálum eftir áheitan frá vinnuni í oktober 2002 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina skipan, sum hevði til endamáls at fáa ullina til høldar. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Bóndafelagið, Óðalsfelagið, Jarðarráðið, Almennar Royndir og Ráðgeving, MBM og Vinnumálaráðið.

Endamálið við arbeiðinum hjá bólkinum var umframt at fáa ullina til høldar, eisini at betra um góðskuna av ullini og samstundis at økja um marknaðarvirðið á tilfeinginum, so at játtanin á figgjarlógini so við og við gerst óneyðug.

Arbeiðsbólkurin gjørdi eitt álit, har mælt var til at seta ullamóttøkur á stovn, sum skuldu savna ullina saman, turka og flokka hana. Fyri at fáa gongd í innsavnanina var mælt til at lata eina stuðulsjáttan í eitt 5 ára skeið.

Landstýrismaðurin valdi at fylgja álitinum og lat eina játtan á figgjarlógini fyri 2003, sum skuldi umsitast av Almennum Royndum og Ráðgeving. Alm. Royndir og Ráðg. lýsti síðan eftir ullamóttøkum og setti í juni 2003 tvær, eina í Vági og eina í Gøtu.

Ullin er savnað inn, ullamóttøkurnar hava latið nakað fyri ullina, umframt at seyðaánarnir hava fingið 4,- kr. í stuðuli fyri kg, og 2,- kr. kg í flutningsstuðli, har ikki landfast er. Alm. Royndir og Ráðg. hevur umsitið og ávíst stuðulsjáttanina, meðan ullamóttøkurnar hava savnað ullina inn og fingið hana til høldar.

Arbeiðsbólkurin væntaði at kunna savna um 50 tons av ull um árið, men sum sæst í niðan-fyristandandi talvu, komu uml. 58 tons inn í 2003 - og eru umboðini í arbeiðsbólkinum fegin um, at tiltakið er so væl móttikið av seyðaánarunum. Út frá talvuni sæst eisini, at mesta ullin í mun til áseyðatalið, er komin inn í Streymoy og Suðuroy, meira enn eitt kg. pr. áseyð.

Vónandi fer væleydnaða tiltakið at eggja teimum til, ið ikki tóku undir við tí í 2003. Hetta skuldi so fört við sær, at ullin í framtíðini ikki kemur at vera til ampa, men heldur til nyttu, og kanska kemur aftur til sín rætt, so gamla orðatakið »ull er Føroya Gull« aftur kann verða nýt.

Móttikin ull í alt 2003

Stað	kg ull	kr. stuðul	Innbetaldur	útgoldið í alt
Norðoyggjar	4.034	16.136	8.068	24.204
Eysturoy	13.465	53.860	0	53.860
Streymoy	17.116	68.464	0	68.464
Vágar	4.111	16.444	8.222	24.666
Sandoy v.m.	4.155	16.618	8.309	24.927
Suðuroy	16.063	64.250	0	64.250
Í alt	59.973	235.892	24.599	260.491

Innsavnað ull í mun til áseyðatalið í økjunum:

Stað	Áseyðatal	kg ull pr. áseyð	
Norðoyggjar:	9.764	0,42	- - -
Fuglø, Borðoy, Viðoy, Borðoy, Kunoy, Kalsoy			
Eysturoy:	15.861	0,85	+
Streymoy:	14.772	1,16	+ + +
Streymoy, Nólsoy (onki úr Fótlanga 768 seyðir = 14,004)		1,22	
Vágoy v.m.:	7.316	0,56	-
Vágar, Mykines (onki úr Hestavatni 1.828 seyðir = 6,208)		0,65	
Sandoy v.m.:	5.764	0,47	- -
Sandoy, Skúmoy, Hestur, Koltur (onki úr Skúmoy 900 seyðir = 7,764)		0,54	
Suðuroy v.m.:	14.427	1,11	+ +
Suðuroy og Dímun (onki úr Dímun 460 seyðir = 13,877)		1,19	
Í alt	70.834	0,83	0,87

Myndir sýnir, hvussu nógv varð goldið ískt fyri innkomnu ullina og, hvussu nógv ull kom inn í mun til áseyðatalið í ymsu økjunum

Eiði kjakast betur enn Kambsdalur

Kjakið gekk betur á valfundinum í tí nýggju høllini á Eiði enn í høllini á Kambsdali, meina eygleiðarar

VALFUNDUR
Búi Tyril

Fyrsti valfundurin í Eysturoynni var tann á Eiði, sum varð hildin seinasta mikudag

Mynd: Regin Jacobsen

Uppmøtingin til valfundirnar í Eysturoy hevur verið góð og tiltøkini nærkast sínari finalu í Runavík, nú bæði Eiði og Kambsdalur hava havt hvør sítt tørn. Hóast ymiskar meiningar um tað kjakliga stigið sum heild, so vil onkur meina at Eiði megnaði betri enn Kambsdalur at fáa í lag veruligt politiskt kjak.

- Tað hevur gingið ógvuliga væl higartil, viðmerkir Regin Jacobsen, sum vegna valfeløgini stendur sum fyriskipari av tiltøkunum.

Ó væntað 200 fólk møttu upp á Eiði tá Ítróttarhøllin har tann 7. januar fyri fyrstu ferð skuldi nýtast til eitt størri alment tiltak. Tað skilst at kjakið har fekk eitt ávíst flog, væl hjálpt av orðstýraranum Sámal í Skorini. Samstundis varð latið væl at fyrireikingini.

Diskussiónirnar snúðu seg fyri stóran part um møguligan stuðul til kreppurakta rækjuvinnu og spurningin um grundlóg í Føroyum. Tey flestu valevnini, burtursæð frá Tjóðveldinum, vístu seg at vera sinnað at veita stuðul onkursvegna til rækjuvinnuna eins og flestu valevni, burtursæð frá Sambandinum, vóru positivt sinnað mótvegis tankanum at fáa eina føroyska grundlóg.

Uppmøtingin tann 11. januar á Kambsdali, sum liggur í einum fólkatættari umráði, var einar tríggjar ferðir størri enn tann á Eiði. Tó meinti onkur at kjakið ongantíð kom veruliga uppfrá hóast tað fína skúlaumhvørvið á staðnum.

- Stakmálini tóku ov nógv yvir meðan prinsippmálini duttu mestsum heilt burtur, helt ein av luttakarunum.

- Tað er sum um at nógvir føroyingar vilja hava politikararnar at agera sum rakstrarleiðarar.

Millum stakevnini var spurningurin um Landssjúkrahúsið skal hava loyvi til at halda stongt um summarið.

Triði og seinasti valfundur verður hóskvøldið kl. 19.30 í Ítróttarhøllini í Runavík.